# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg sá fleiri logandi fólk, men eg kvikaði mær út, tí eg var bangin fyri, at flogfarið sprongdist (ferðafólk í Phuket).*

# Kanna nú svørtu kassarnar

**Teilendsku myndugleikarnir kanna nú teir báðar svørtu kassarnar úr vanlukkuflogfarinum á Phuket**

Flogvallarbygningurin á teilendsku oynni Phuket líktist mest einum líkhúsi í gjár. Í fleiri røðrum lógu hvítir plastikkposar við líkunum av teimum 88, sum doyðu, tá eitt innanríkisflogfar við 132 fólkum umborð fór á glið, júst sum tað setti seg. 42 sluppu við lívinum, men fimm teirra hava fingið so álvarssaman skaða, at tað stendur um lív hjá teimum.

Tveir sviar sluppu frá vanlukkuni á lívi, men tvey aðrir sviar eru ikki komnir afturíaftur, og hildið verður, at teir doyðu í vanlukkuflogfarinum. Fleiri aðrir útlendingar úr eitt nú Kanada og Fraklandi eru millum tey deyðu.



*Tað er næstan einki eftir av flogfarinum, tí tað, sum ikki brotnaði, koladist upp*

# Aftur til Portugals



*Gerry og Kate McCann bíða eftir boðum um at fara aftur í flogfarið til Portugals*

**Portugisiska løgreglan fer væntandi at senda boð eftir foreldrunum hjá Madeleine McCann, men tey ætla sær ikki aftur til Portugals**

- Tey hava ikki fingið boð úr Portugal enn, men tað tykist greitt, at portugisiska dómsvaldið fer at biðja løgregluna senda boð eftir teimum, sigur Sky News.

Síðani í síðstu viku hevur portugisiski dómarin Pedro dos Anjos Frias kannað ta drúgvu frágreiðingina, sum hann fekk um málið við Madeleine McCann, ið hvarv tann 3. mai. Sambært Sky News hevur hann eisini fingið ein fyrispurning frá portugisisku løgregluni, tí hon vil fegin hava Gerry og Kate McCann til avhoyringar eina ferð afturat. Formliga eru tey bæði undir illgruna fyri at hava beint fyri Madeleine.

Gerry og Kate McCann hava boðað bretsku fjølmiðlunum frá, at tey vilja hava frið nú, so hini bæði børnini kunnu fáa ein vanligan gerandisdag aftur. Tey skulu samstundis hava boðað frá, at tey ætla sær ikki aftur til Portugals, men at tey kortini fara, um løgreglan krevur tað.

# Lugovoj ætlar sær á ting

**Fyrrverandi KGB-maðurin Andrej Lugovoj ætlar sær í russiska tjóðartingið. Bretar halda, at hann myrdi Alexander Litvinenko**

Setir Andrej Lugovoj fótin á bretska jørð, verður hann tikin alt fyri eitt, tí í Bretlandi er hann eftirlýstur í sambandi við morðið á fyrrverandi KGB-mannin Alexander Litvinenko í London í november í fjør.

Bretland hevur kravt at fáa Lugovoj útflýggjaðan, men gongst sum ætlað kann hann skjótt fjala seg aftan fyri politiskt órin. Sambært russiskum fjølmiðlum fer Lugovoj at stilla upp fyri tann høgrasinnaða Liberaldemokratiska Flokkin hjá Vladimir Sjirinovskij á tjóðartingsvalinum í desember.



*Andrej Lugovoj. Bretar leggja hann undir morð, men russar ætla at velja hann inn á ting*

## STUTT SAGT

### Væntar kríggj við Iran

Franski uttanríkisráðharrin heldur, at altjóða samfelagið noyðist at fara munandi harðari til verka fyri at noyða Irn at sleppa sínum kjarnorkuætlanum. Í einari útvarpssamrøðu í gjár segði Bernard Kouchner, at fransmenn eiga at fyrireika seg til kríggj við Iran, sjálvt um tað ikki verður fyrsta dagin. Í síðsta mánað segði franski forsetin, Nikolas Sarkozy, kemur einki burtur úr teimum diplomatisku royndunum at fáa Iran at sleppa kjarnorkuætlanunum, eru bara tvinnir møguleikar. Annar er, at Iran fær eina bumbu, ella at Iran verður bumbað.

### Bush funnið avloysara

Í USA hevur George W. Bush, forseti, gjørt av at tilnevna fyrrverandi dómaran Michael Mukasey løgmálaráðharra eftir Alberto Gonzales, sum herfyri boðaði frá, at hann leggur frá sær í morgin eftir hvassar atfinningar. Tann 60 ára gamli Michael Mukasey ber orð fyri at vera ein konservativur dómari, og hann hevur millum annað virkað sum dómari í nøkrum rættarmálum um yvirgang. Senatið skal góðkenna hann sum løgmálaráðharra.

### Kanada atkvøddi ímóti

Upprunafólk í Kanada eru sera misnøgd við, at landið atkvøddi ímóti einari samtykt í ST um rættindini hjá upprunafólki kring heimin. Bara fýra lond atkvøddu ímóti. Kanadiska stjórnin umber seg við, at galdandi lógir veita upprunafólkinum í Kanada tey neyðugu rættindini, og at partar av altjóða samtyktini eru í stríð við galdandi kanadiska lóg. Tí kundi landsins umboð í ST ikki atkvøða fyri, sigur stjórnin.